Filmsfelagið Klipp: Maður eins og eg

Myndir úr filminum

Mánadagin 6. januar tekur KLIPP, Filmsfelag Norðurlandahúsins, uppaftur sýningarnar við nýggjum, góðum filmum. Sýndur verður íslendski filmurin "Maður eins og eg", sum hin ungi Robert I. Douglas hevur stjórnað

FILMUR
Filmsfelagið Klipp

Í Reykjavík og Hong Kong: Nýggi íslendski filmurin "Maður eins og eg" er nútíðar Romeo og Julia søga, sett í Reykjavík og Hong Kong.

Høvuðsleikari er ungi íslendingurin Júlli, hvørs hjúnalag syndrast, umframt at hann gerst arbeyðsleysur. Men so gerst hann púra býttur í gløggu og arbeiðssomu Qi, sum er tilflytari úr Asia. Hon arbeiðir á matstovuni hjá systrini og lærir seg íslendskt, so hon kann søkja sær annað og betur lønt arbeiði í hesum fremmanda landi.

Sambandið millum eystur-lendsku Qi og íslendska Júlli gerst so fløkjasligt, at Qi fer aftur til Hong Kong. Júlli fer aftaná, men vendir heim aftur, sum av torvheiðum. Til tess at gloyma Qi, tekur hann lesturin uppafturat og fær eina útbúgving.

Í Reykjavík fær Júlli tamarhald á lívinum, til hann ein dagin hittir Qi á gøtuni, berandi barn undir belti - barn hansara.

John Gnarr

"Maður eins og eg" er bæði skemtilig og hugvekjandi kærleikssøga um ekkaleyst sjálvlærdur innan filmsgerð og uttan eftirlæti at fylgja egnum ynskjum.

Høvuðsleiklutirnar hava kendi íslendski skemtarin John Gnarr og Spehanie Che, sum er films- og poppstjørna í Hong Kong.

Eisini síggja vit sjónleikarakvinnuna Mariu Ellingsen, sum er av føroyskari ætt.

Robert I. Douglas

Ungi íslendski leikstjórin Robert I. Douglas er av íslendskari og írskari ætt. Hann hevur lisið miðlafrøði í Norðurírlandi, men er

Robert hevur vunnið fleiri virðislønir fyri stuttfilmar og fyrsti sælifilmur hansara "Íslendski dreymurin" (2001) fekk framúr viðmæli og vann fleiri altjóða virðislønir.

Robert I. Douglus verður mettur sum hin mest nýskapandi filmsleikstjórin í Íslandi ídag.

Filmurin "Maður eins og eg" er annar sælifilmur Roberts. Filmurin verður sýndur í Norðurlandahúsinum mánadagin 6. janaur 2003 klokkan 19:30.

Móttøka

Um ársskiftið leggur Bárður Jákupsson frá sær, eftir at hava virkað í fjórðings øld sum leiðari fyri Listaskálanum og Listasavni Føroya, og Jens Damsbo Frederiksen tekur við sum nýggjur stjóri.

Í hesum sambandi er almenn móttøka í Listaskálanum

3. januar 2003 kl. 16–18

Øll eru hjartaliga vælkomin.

Listasavn Føroya

Tøkk

Øllum tykkum sum mintust meg á 90 ára føðingardegi mínum, takki eg hjartaliga. Gott nýggjár øll somul.

Saloma Frederiksen, Múla

Til abba mín Jens Clement Hansen

Seinasta heilsan til tín vakra menniskja

Ársins fyrsti dagur
Á vegnum hómast gler
Í fjøllunum er kavi
Vøkur sjón tað er.

Eins vøkur og tann myndin
Er minni mítt um teg
Um lívið góði abbi mín
Hvønn dag tú lærdi meg

Við tínum stilla lyndi
Tú príddi henda heim
Tú vart ein vøkur menniskja
Í gleði og í gleim

Ársins fyrsti dagur
Tá fekst tú abbi frið
Sum bert tey deyðu kenna
Har gleðin varðar við

Góði besti abbi
Tú sveima manst í nátt
Í rósufari kæri tú
Sangur ljómar hátt

Sangurin um lívið
Gleði sorg og frið
Sangurin um himmalin
Har gleðin varðar við

Sædis

Ósemjur prógv um fólkaræði

Keglið og stríðið, sum merkti politiska lívið í 2002, fekk heiðursplkáss í nýggjársrøðuni hjá løgmanni. Hann helt opna kjakið verið eitt sunt tekin, ið bar boð um eitt livandi fólkaræði, og bað fólk um ikki at ræðast hugsjónirnar

NÝGGJÁRSRØÐA
Ingi Rasmussen

Løgmaður fegnaðist millum annað um Vágatunnilin í sínari nýggjársrøðu, men Jóannes Eidesgaard saknaði, at løgmaður eisini tók viðbrekin mál til viðgerðar, so sum støðuna hjá føroyska rættarsamfelagnum

Mynd: Jens K. Vang

Árið 2002 var eyðkent av politiskum ósemjum.

Hesa sannroynd var Anfinn Kallsberg løgmaður maður fyri at viðurkenna, tá hann á gáttuni til 2003 helt sína nýggjársrøðu fyri føroyingum gamlaárskvøld.

Hann ráddi fólkinum til ikki at fella í fátt av hesari orsøk. Heldur eiga vit at ásanna, at vit hava eitt livandi fólkaræði, har fólkavald umboð telva seg fram til semjur, hóast ósemjan mangan er stór.

– Í Føroyum er politiskur opinleiki, sum verður varpaður gjøgnum fjølmiðlarnar. Fjølmiðlar eru í dag avgerandi fyri fólkaræði – ein styrki, sum vit eiga at fegnast um. Politiska lívið í Føroyum er margfalt. Tað hevur sínar søguligu orsøkir. Hóast fá, eru vit ymisk, og hóast ymisk, eru vit í somu støðu. Vit eru øll javnbjóðis føroyingar, sum hava javnbjóðis rætt at koma til orðanna, segði løgmaður.

Á egnan mátt

2002 var valár, og nýtt landsstýri varð skipað. Fullveldissamgongan helt fram við stuðli frá Miðflokkinum, sum tryggjaði samgonguni meiriluta.

Ferðin móti fullveldinum er sett niður, og nú er málið at laga búskapin stigvíst, so hann gerst sjálvberandi og byggir á framleiðsluvirði føroyinga.

Løgmaður hevði hug til at gera tað til ein spurning um at hava hugsjónir.

– Tað tryggasta og skilabesta er at hava støði í okkara egnu búskaparligu fortreytum og ikki líta á tað, sum verður veitt okkum frá øðrum. Tað, sum kemur lætt, fer lætt. Vit vilja lækka peningaliga stuðulin úr Danmark. Vit líta á, at vit við búskaparligari á-byrgd vilja loysa nýskapandi og hugsjónarliga megi í fólki okkara, segði Anfinn Kallsberg løgmaður.

Hann segði eisini, at tað skulu breiðir herðar til at bera góðar tíðir, og tað mátti ásannast, tá arbeitt varð við fíggjarlógini. Fíggjarlógin var av mongum mett sum elddópurin hjá nýggju samgonguni, sum við bit og slit stóð royndina.

– So mikið nógv stríð og kegl var, at fólk helst hava ivast í, um nakað gott kundi spyrjast burturúr. Loksins kann tíbetur staðfestast, at samgongan stóð sum ein maður, nú fíggjarlógin varð samtykt, segði løgmaður.

Nýggj mál

Annars mintist løgmaður til nakrar av teimum stórhendingum, sum hava sett dám á árið, ið fór. Hann fagnaði okkara ítróttafólkum, serliga innan svimjing og fótbólt, sum aftur hava sett Føroyar á heimskortið. Og hann dró tónleikin fram og segði føroyingar vera í fremstu rað, tá tað ræður um nútímans tónleik.

Dagurin, 10. desember 2002, tá Vagatunnilin varð tikin í nýtslu, var sjálvandi tikin fram, og løgmaður fegnaðist saman við restini av føroyingum um, at koyrandi er undir Vestmannasundi. Og við Vágatunlinum í huga hugdi løgmaður nøkur ár fram í tíðina.

– Um fá ár verður eisini fast samband til Norðoyggjar. Tá hetta er rokkið, má langtíðarmál okkara vera at knýta bæði Sandoynna og Suðuroynna í undirstøðukervið. Tá verða Føroyar knýttar saman í eitt meginøki, segði løgmaður.

Eisini í sjálvstýrismálinum nýtti løgmaður høvi at bjóða framtíðini av.

– At fremja stór stig er mangan torført. Men søga okkara prógvar, at tað ber til at náa málum á tjóðskaparleið. Mangan hevur verið ósemja um slík mál. Felags eyðkennið hevur verið, at tá málini eru framd, vilja øll eiga tey. Vit eiga tí ikki at ræðast hugsjónina, men heldur hugsjónarloysið, segði løgmaður við føroyingar, tá hann ynskti okkum øllum gott nýggjár.

Hugsjónarleys røða

Hugsjónirnar hildu ikki nýggjár saman við løgmanni, heldur Lisbeth L. Petersen, sum helt lítið spennandi vera í nýggjársrøðuni hjá Anfinn Kallsberg

NÝGGJÁRSRØÐA
Ingi Rasmussen

Nógv føgur orð, men tey vóru fyri tað mesta tóm og uttan innihald.

Lisbeth L. Petersen, forkvinna í størsta andstøðuflokkinum á løgtingi, Sambandsflokkinum, er eirindaleys í sínari meting av nýggjársrøðu løgmans. Har var stutt sagt ov lítið innihald, heldur hon.

– Løgmaður segði ikki nógv, men eg hevði heldur ikki væntað annað, sigur hon

Lisbeth L. Petersen hefti seg við orðini hjá løgmanni um, at uttan mun til, hvørjar íløgur verða gjørdar, skal nóg mikið vera eftir, so tey gomlu, tey sjúku og tey, sum ikki sjálv klára seg, kunnu fáa nóg mikið til at liva eitt gott lív.

– Tað verður tað ikki, sigur Lisbeth L. Petersen, sum er limur í fíggjarnevndini hjá løgtinum. Størsti feilurin, sum varð gjørdur í fíggjarlógarviðgerðini, var netupp, at har var ikki nokk sett av til okkara gomlu, sjúku og veiku, sigur hon.

Løgmaður brúkti nógva orku til at greiða frá, at nógvu ósemjurnar í samgonguni síðsta árið í roynd og veru eru eitt tekin um eitt sunt kjak, har øll sleppa til orðanna.

– Eg havi næstan ikki orð fyri, hvat eg skal siga til slíkt. Umberingarnar fyri klandur og stríð í samgonguni vóru betri ósagdar, tí hesum hava vit havt ovmikið av, síðan hendan samgongan kom til, sigur Lisbeth L. Petersen.

Løgmaður tosaði eisini um hugsjónir og hevði hug at seta javnatekn millum hugsjónirnar og politikkin hjá samgonguni móti størri sjálvstýri.

Men tað var júst hugsjónirnar, sum Lisbeth L. Petersen saknaði í røðu løgmans.

– Har vóru als ongar hugsjónir at taka støðu til. Tað bleiv ikki til annað enn tóm orð, men røðan var hinvegin ikki øðrvísi, enn eg hevði væntað, sigur Lisbeth L. Petersen.

Løgmaður gloymdi rættarsamfelagið

Rættarsamfelagið er í vanda, og tí átti løgmaður at tikið hetta málið til viðgerðar í nýggjársrøðuni, heldur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum

NÝGGJÁRSRØÐA
Ingi Rasmussen

»Tað, sum løgmaður ikki segði, segði meira enn tað, sum hann segði.«

Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum, saknaði meira enn hann fekk, tá hann lurtaði eftir nýggjársrøðuni hjá Anfinn Kallseberg løgmanni gamlaárskvøld.

– Løgmaður hevði gjørt klókt í at tikið støðuna hjá føroyska rættarsamfelagnum upp í nýggjársrøðuni, tí eg eri bangin fyri, at vit eru um at koma okkum út í óføri og eru um at missa takið á rættarsamfelagnum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann vísir á nógvu málini í síðstuni, har bæði umboðsmaðurin, rætturin og seinast ein kanningarstjóri hava talað at politisku umsitingini. Tað verður bara tikið til eftirtektar og so hendir ikki meira, sigur hann, og sipar ikki minst til málini, har Jørgin Niclasen landsstýrismaður hevur staðið fyri skotum.

– Politiska leiðslan er eftir øllum at døma farin at góðtaka eina skeiva gongd, og tað kunnu vit ikki góðtaka. Nú ein kanning til dømis staðfestir, at umsitingin hjá einum landsstýrismanni hevur borið seg skeivt at, verður ivi sáddur um kanningina, og tað haldi eg vera ræðandi, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tað hevði verið skilagott av løgmanni at steðga á og at tikið slík stórmál fram, tí tað kundi skapt álit aftur á politisku skipanina millum fólk, heldur hann.

– Hendan samgongan miðar ímóti fullveldi, men hvussu verður vorðið, tá vit taka ábyrgdina av okkara rættarskipan? Tað spyrja fólk í hesum døgum, tá onki tykist at fáa nakrar avleiðingar, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann hevur hug at smílast, tá vit spyrja hann um orðini hjá løgmanni um, at nógva innanhýsis stríðið í samgonguni er eitt tekin um eitt livandi fólkaræði.

– Eg haldi tað heldur siga nakað um eina veika politiska leiðslu. Eg havi sjálvur sitið í seks ár út í eitt í landsstýrinum, og tá ráddi um at fáa semju um politikkin og at melda samt út. Nú uppliva vit alt meiri, at samskipanin er vánalig, so tann tiltikna høgra hondin ikki veit, hvat vinstra ger, sigur Jóannes Eidesgaard.

Ósemjan er eisini óheppin fyri andstøðuna, heldur hann, tí ósemjurnar í samgonguni verða meiri áhugaverdar hjá fjølmiðlunum enn sjónarmiðini hjá andstøðuni.

Samanumtikið saknaði hann nógv. Hann helt tað vera gott, at løgmaður fegnast um mentan, list og undirsjóvartunnil, men hann eigur eisini at taka viðbrekin mál fram og viðgera tey.